# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

# Nýggjur Honda CR-V



*Nýggi Honda CR-V er ein heilt nýggjur SUV (Sport Utility Vehicule). Sporvídden er økt, og 17" hjól eru nú standard*

**Honda CR-V var ein slóðbrótari í sínum klassa, tá hann fyrstu ferð kom á marknaðin fyri 11árum síðan. Umleið 2,5 milliónir CR-V eru seldir higartil. Nú kemur so triðja generatión**

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggi Honda CR-V er ein heilt nýggjur bilur, ein sonevndur SUV við nútímans designi og innrætting. Eitt sereyðkenni fyri forgangaran var eykahjólið á baklúkuni, men tað er nú lagt inn í bilin, har sum tað vanliga plagar at vera.

Innrættingin er einføld og liðilig. Girstongin situr sera væl fyri í instrumentborðinum, og bilurin er lættur at handfara og koyra. Við nýggju konstruktiónini er tyngdipunktið lægri, sporvíddin er økt og 17" hjól eru standard – alt fyri at geva optimalar koyrieginleikar umdir øllum koyriumstøðum.

Bilurin hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir sum t.d. VSA (elektroniskt stabilitetsprogram) við TSA (Trailer Stability Assist), sum ger tað tryggari at draga ein viðfestisvogn. Dieselútgávan kann draga ein viðfestisvogn, sum vigar upp til 2 tons.

CR-V fæst bæði sum bensin og diesel: 2,0-litur bensinmotorin við 150 hk er ein heilt nýggjur motorur við støði í einum motori, sum eisini er í nýggja Honda Civic. Dieselmotorurin er tann sami væl umtókti 2,2-litur við 140 hk, sum eisini er í forgangaranum. 6-trins girkassi er standard.



*Eykahjólið á baklúkuni, sum var eitt sereyðkenni fyri forgangaran, er nú lagt inn í bilin*



*Einføld og brúkaravinarlig innrætting. Girstongin situr sera væl fyri í instrumentborðinum*






Nissan Sunny 1.4i

Nissan Sunny 1.4i við m.ø. alufelgum, fløguspælara og hita í setrunum, árgang 1994. Vetrardekk á felgum fylgja við.

Til sølu fyri **kr. 17.000,-**

**Tel. 216135**